Bill Justinussen:

# Kanska var eg nakað óstortsligur

**– Men eg farin ikki at velja siðseminevndina av nýggjum, bara tí at einstakir løgtingsmenn eru ósamdir við mær, sigur Bill Justinussen**

SIÐSEMINEVNDIN
*Áki Bertholdsen*



*–Eg eri so nýggjur í politikki at eg havi ikki reiðiliga funnið útav, hvussu ein landsstýrismaður eigur at fara fram, tá ið nevndir og ráð skulu veljast, sigur Bill Justinussen*

– Kanska var eg nakað óstortsligur, tá ið eg valdi siðseminevndina.

Bill Justinussen, landsstýrismaður ásannar nú, at hann átti at verið farin øðrvísi fram, tá ið hann valdi siðseminevndina av nýggjum.

Hann sigur, at hann er so nýggjur í politiska starvinum, at hann hevur ikki ordiliga funnið útav, hvussu ein landsstýrismaður eigur at fara fram í øllum lutum, eitt nú tá ið nevndir og ráð skulu veljast, sum í hesum føri, tí enn kennir hann ikki allar tættir í tí politiska virkseminum.

– Tað havi eg ongar trupulleikar við at viðganga, leggur hann afturat.

Hinvegin ger hann heilt greitt, at hann velur ikki nevndina av nýggjum.

– Skal nevndin veljast av nýggjum, má onkur annar gera tað. Men tað fái eg heldur ongar trupulleikar av.

Hann sigur, at hann kann ikki broyta støðu, hvørja ferð, onkur løgtingslimur er ónøgdur, tí so skuldi hann broytt støðu alla tíðina.

Men samstundis heldur hann eisini, at tað, hann hevur gjørt, kann forsvarast.

– Tað er mín skylda, sum landsstýrismaður at velja siðseminevnd. Skuldu vit treytaleyst fylgt tilmælunum frá umsitingini, hevði tað verið rættast at tikið ábyrgdina frá landsstýrismanninum og latið umsitinginina valt nevndina, tí so sluppu vit undan trupulleikunum.

– Eg havi so onki ímóti at sleppa undan ábyrgdini av at velja siðseminevndina.

– Men eg má so eisini spyrja, hvat liggur í tí, at landsstýrismaðurin skal velja nevndina? Skal hann so ikki kunnu velja tey, sum hann vil og hevur álit á?, spyr landsstýrismaðurin.

### Ikki valt vinfólk

Hann vísir eisini á, at tað, at nýggj nevnd er vald, merkir ikki tað, at hann hevur vrakað limirnar, sum sótu í nevndini frammanundan.

– Eg kenni ikki teirra hugsunnarhátt. Hinvegin kenni eg heldur ikki eg heldur ikki øll tey, sum nú eru vald í nevndina, tí eg havi ongantíð hitt summi av teimum og eg eri ikki vinfólk við nøkur av teimum. Tí er tað heilt burturvið at skíra hetta vina- og kenningapolitikk.

– Eg veit heldur ikki, hvørja politiska áskoðan hesi fólkini hava. Ongin av teimum hevur verið virkin í miðflokkinum og tann eini nevndarlimurin hevur enntá sitið á tingi fyri fólkaflokkin eitt skifti fyri nøkrum árum síðani.

Tí heldur Bill Justinussen als ikki, at hetta kann samanberast við málið, tá ið Signar á Brúnni, sum tá var landsstýrismaður, valdi útvarps- og sjónvarpsnevnd og fekk harðligar ábreiðslur fyri at hava valt ov nógv tjóðveldisfólk.

– Hinvegin kann ein landsstýrismaður ikki velja fólk í eina nevnd, sum hann als onki kenni til, tí tað er ómøguligt .

– Skuldu øll tey, eg kenni hugsjónirnar hjá, verið skúgvað til viks, hevði tað merkt, at túsundtals føroyingar frammanundan vóru diskvalifiseraðir og tað kann heldur ikki vera ætlanin.

– Hinvegin slepst ikki undan, at nevndir og ráð eru forlongdi armurin hjá politiska valdinum og tað hevði verið trupult at valt fólk í nevndina, sum eru politisk mótstøðufólk.

– Hevur nevndin onki við politikk at geva, hví skal hon so veljast eftir hvørt løgtingsval? Er talan um eina fakliga nevnd, eigur tað at vera umsitingin, sum velur hana og ikki landsstýrismaðurin.

Bill Justinussen sigur, at tey, sum gjørdu lógina, sum siðseminevndin arbeiðir eftir, hava ikki hugsað so nógv um samanhangin í arbeiðnum. Hinvegin hevur umsitingin mett, at reglarnr eiga at broytast, so at øll nevndin ikki verður skift út í senn.

– Sum er, kunnu nevndarlimir bara veljast aftur einaferð.

Fyri at tryggja samanhangin í vendina, gjørdi eg tískil av at velja fýra nýggjar limir í nevndina nú. Næstu ferð verða so teir tríggir læknarnir skiftir út, tí tá skulu teir skiftast út eftir lógini. Varð øll nevndin afturvald nú, skuldi eisini øll nevndin verðið skift út næstu ferð, eydnast tað ikki at broyta reglarnar.

### Ósakligt

Samstundis átalar hann harðliga skuldsetingarnar frá Annitu á Fríðriksmørk, løgtingskonu fyri tjóðveldisflokkin, um at hann skal hava valt umboð fyri víðgongdar minnilutabólkar í siðseminevndina.

– Eg havi ikki valt umboð fyri ávísar samfelagsbólkar í nevndina.

Bill Justinussen sigur, at tað, hann hevur hugsað um, er at velja fólk í nevndina, sum hann metir eru væl skikkað at kjakast um siðsemiligar spurningar.

Hann sigur, at hann kennir teirra lívsáskoðan út frá tí, at tey tikið lut í almennum orðaskifti og tað er útfrá tí, at tey eru vald í nevndina.

– Men at døma Onnu Lenu Olofson út frá tí, at hon er kona Peter O. K. Olofson, heldur enn at døma hana útfrá tí, at hon er guðfrøðingur, er ósakligt.

– Tað er ósakligt bara at døma nevndarlimirnar út frá einum og sama felagsnevnara, nevniliga at tey hava gjørtvart við seg á átrúnaðarliga økinum og at gloyma allar aðrar felagsnevnarar, sigur Bill Justinussen.

– Harumframt er tað ein lóg, sum altíð skal fylgjast, tá ið nevndir og ráð verða vald og tað er javnstøðulógin, og sostatt umboða tær báðar kvinnurnar í nevndini, allar kvinnur í Føroyum, leggur hann afturat.

# Fingu 25.000 krónur til útgerð at bjarga fólki við

**Peningurin kemur serstakliga væl við, sigur Kári Hammer í Suðuroyar Syðra Bjargingarfelag**

GÁVA
*Áki Bertholdsen*

–Hetta kemur ómetaliga væl við

Í Bjargingarfelagnum í Suðuroyar Syðru helvt eru tey serstakliga væl nøgd við gávuna, sum tey mikukvøldið fingið frá Lions Klubbanum í Suðuroy.

Á lítlari samkomu í Stóra Pakkúsi í Vági mikukvøldið, handaði Lions forsetin í Suðuroy, Leivur Nygaard, Bjargingarfelagnum í Suðuroyar Syðru helvt ein kekk upp á 25.000 krónur.

Kári Hammer, sum tók ímóti kekkinum fyri felagið, sigur, at gávan kemur serstakliga væl við.

Peningurin skal brúkast til at keypa eina hydrauliska pumpu til bilasaksin hjá felagnum við.

Felagið eigur ein saks, sum verður brúktur at klippa bilar sundur, tá ið fólk sita føst eftir vanlukkur.

Men higartil hava tey verið noydd at pumpa við hondmegi og tað krevur bæði nógv fólk og nógva tíð.

– Tá í ein vanlukka hendir, eru tað viðhvørt minuttir ella sekund, sum eru munurin ímillum lív og deyða og tí er ein hydraulisk pumpa til saksin altørvandi. Kári Hammer sigur, at hann sparir 2/3 av tíðini og hann sparir tveir mans, so tað er eyðsæð, hvønn týdning, ein slík pumpa hevur, tí nú er nóg mikið við einum manni at passa pumpuna, har tað frammanundan mátti verða tríggir, sum skiftust um at pumpa við egnari megi.

Hann vísir á, at alt sum ferðslan alsamt økist, slepst heldur ikki undan, at talið á vanlukkum eisini veksur og tíverri hava teir nakrar ferðir havt brúk fyri saksinum.

Sjálvt hevði felagið ongan møguleika havt at keypt sær eina slíka pumpu, tí tað hevur tað ikki ráð til. Í felagnumer bara sjálvboðin arbeiðskraft og hóast kommunan er ófør at hjálpa og nøkur oyru eisini fáast á fíggjarlógini, er tað verri enn so nóg mikið og tí hevði pumpan ikki verðið keypt, uttan hendan stuðulin.

Á vaktarlistanum hjá felagnum eru 10 mans, men tað stendst ongantíð á at fáa fólk, tá ið á stendur, tí hendir eitthvørt, eru tað altíð fleiri sum bjóða seg fram a hjálpa til, sigur Kári Hammer.

Pumpan er nú bíløgd og kemur skjótt.




*Leivur Nygaard, Lions forseti í Suðuroy, v.m. handar Kára Hammer í Bjargingarfelagnum í Suðuroyar Syðru helvt ein kekk upp á 25.000 krónur, sum felagið fer at brúka til serliga útgerð*



# Vágs kirkja sandblást

**Vindeyguni í kirkjuni í Vági eru sandblást og eru nú sum nýggj. Ókendur gevari lat gávu til umvælingina av kirkjuvindeygunum, og nýggir rútar verða nú settir í – eini 1000 í tali**

KIRKJUTÍÐINDI
*Dagfinn Olsen*




*Vágs kirkja. Vindeyguni eru nú sandblást og eru sum nýggj. Nú er bert eftir at seta teir 1000 rútarnar í*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

Síðstu tvær vikurnar er stórarbeiði farið fram við kirkjuna í Vági. Menn hava arbeitt tíðliga og seint, og stórar maskinur hava verið í gongd og ikki sørt av gangi hevur staðist frá kring kirkjuna.

Talan er um, at vindeyguni í kirkjuni eru sandblást.

– Frá ónevndum gevara fekk kirkjan í heyst gávu, ið skuldi nýtast til vindeyguni, har nakað av rusti var komið í. Men nú er kirkjan sera vøkur. Vindeyguni eru sandblást, metalliserað og málað hvít. Nú eru tey sum nýggj. Nýtt glas verður sett í, og talan er um nógvar smáar rútar. Eg taldi einar 860 í kirkjuskipinum, og so er nakað afturat, so talan er óivað um meira enn 1000 rútar, sigur Jóhannis Østerø, kirkjuráðsformaður.

### Tipp topp

Guðstænasta hevur seinastu vikurnar verið í Meinigheitshúsinum, men nú verður farið undir at gera reint aftur í kirkjuni og tað tekur nakrar dagar.

Arbeiðið at sandblása hevur gingið skjótt og væl, bert 10 dagar hevur tað tikið, hóast væl meira av tíð var sett av til arbeiðið.

Nú verður farið undir at mála kirkjuna innan. Jóhannis Østerø sigur, at kirkjan verður málað uttan til várs. Ætlanin er at seta kirkjuna í stand, so hon verður tipp topp, sum hann tekur til.

Arbeitt hevur verið við at umvæla múrin, men nakað er eftir at gera enn. Enn lekur eitt sundur í uttara enda. Múrurin hevur verið illa farin, tí hann hevur verið so vátur.

Hóskvøldið var liðugt at sandblása og so vantaði bert at seta teir 1000 rútarnar í aftur vindeyguni í Vágs kirkju, men kirkjuráðsformaðurin vónar, at góð manning fæst til arbeiðið, tí enn siga veðurmenninir frá turrveðri í nakrar dagar.

## James Olsen undirheldur í Klaksvík




**Leygarkvøldið fer James Olsen at undirhalda við sokallaðum »sing-back showi« í Klaksvík. Eisini fer Martin Kjærbo at venda plátum**

DANSITILTAK
*Eyðun Klakstein*

KÍ-høllin fer leygarkvøldið at hýsa einum dansitiltaki, har James Olsen verður høvuðsmaður. Hann fer á pallin við sínum nýggja »sing-back showi«. Hetta merkir, at hann fer at syngja til tónleik, sum er spældur inn á fløgu frammanundan.

Umframt James Olsen fer væl umtókti plátuvendarin Martin Kjærbo eisini at undirhalda fólki við nýggjum dansitónum.

Tiltakið í KÍ-høllini byrjar leygarkvøldið klokkan 23.30 og heldur fram út á náttina.

